# 19 fólk veljast í Tórshavnar kommunu



**Sjálvstýrisflokkurin vil hava rættvísari umboðan í kommunustýrini. Tí hevur flokkurin lagt fram uppskot á ting, um broytingar í kommunustýrislógini**

KOMMUNUR
*Eirikur Lindenskov*

Broytingin førir við sær, at eitt nú Tórshavnar kommuna, eftir verandi fólkatali, skal velja í minsta lagi 19 limir í býráðið.

Uppskotið hjá Sjálvstýrisflokkinum kemur til 1. viðgerð í løgtinginum í morgin.

Sjálstýrisflokkurin sigur, at um vit taka dømi í galdandi Kommustýrislóg, kann ein kommuna ikki hava fleiri enn 17 kommunustýrislimir. Nýggja lógin leggur upp til, at kommunur í minsta lagi skulu hava ein kommunstýrislim fyri hvørjar 1000 borgarar í kommununi, tó í minsta lagi sjey og í mesta lagi 25.

Í mun til verandi skipan leggur uppskotið upp til, at við lóg verður tryggjað, at umboðanin av kommunustýrislimum verður rættvísari í mun til fólkatalið í teimum ávísu kommununum.

- Kommununar gerast alsamt færri og størri, og fleiri landspolitiskar uppgávur verða í framtíðini allarhelst lagdar út til kommunurnar. Eins og í okkara grannalondum kunnu vit staðfesta, at nærdemokrati hevur alsamt størri týdning fyri trivnaðin hjá borgarunum, sigur flokkurin.

Tí metir Sjálvstýrisflokkurin tað verða neyðugt at laga lógina soleiðis, at borgarar framyvir fáa betri umboðan í kommunustýrunum.

Together we make things happen

samskip



> STARV INNAN SHIPPING OG SKRIVSTOVU

Samskip søkir eftir dugnaligum og ágrýtnum fólki til skrivstovu okkara í Havn.

**Vit bjóða** eitt starv í shipping og skrivstovuarbeiði í útflutningi. Í arbeiðinum samskiftir tú við viðskiftafólk og systurfyritøkur í Føroyum og úti í heimi. Tú kemur at starvast í einum lokalum og altjóða kappingarumhvørvi saman við einum ungum og dynamiskum toymi.

**Vit vænta** at tú hevur viðkomandi útbúgving og royndir. At umsøkjarin er nærlægdur, miðvísur og dugir at arbeiða í einum umhvørvi, har úrslit, tænasta og deadline eru lykilorð. Vit vænta at tú dugir væl at samskifta á enskum.

**Løn** sambært avtalu, treytað av útbúgving og royndum.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Joel undir Leitinum, stjóra á telefon 30 88 11.

**Umsókn við CV** skal sendast til: Samskip, Box 3255, FO-110 Tórshavn. Brævbjálvin skal merkjast "umsókn". Umsóknarfreistin er 20. mars. Starvið verður sett skjótast tilber.

Samskip í Føroyum bjóðar viðskiftafólki sínum flutnings- og goymsluloysnir við tilhoyrandi tænastum, bæði í Føroyum og úti í heimi. Samskip er partur av Samskip hf. Hjá Samskipum starvast 1.400 fólk á 59 skrivstovum í 23 londum. Samskip hevur tvey skip skrásett í FAS. Tvær linjur sigla uppá Føroyar. Til og úr Føroyum verður sigt til Immingham, Rotterdam, Cuxhaven, Varberg, Aarhus, Reykjavík og Reyðarfjørðin.

Ágangur

Fundur

Kunnandi fundur verður fyri øllum foreldrum og avvarandi hjá børnum í B36 og annars øllum áhugaðum um átakið

VIT ERU ÍMÓTI
KYNSLIGARI
MISNÝTSLU AV BØRNUM

sum verður í B36-húsinum
mikudagin 12. mars kl. 19:00.

Fólk frá KRIS, løgreglu og Barnabata fara at siga sína hugsan

Ungdómsdeild

agangur.com

KRIS